FAROE UNITED seafood

# Góðskuleiðari

Søkt verður eftir góðskuleiðara til United Seafood á Toftum, at byrja so skjótt sum gjørligt. United Seafood á Toftum framleiðir saltfisk til miðjarðarhavslondini serliga Spania.

**Góðskuleiðarin hevur ábyrgd av hesum økjum:**

- Innaneftirlitsskipanin á virkinum
- HACCP
- Samskifti við almennar heilsumyndugleikar
- Reingerð og reinføri
- Heilsufrøðiligar starvsskipanir
- Reglugerðir (vørulýsingar og merkingar)
- Etikettskipan
- Góðskuskrásetingar og góðskuskjøl
- Tekniskt kundasamstarv
- Klagur og klaguviðgerð
- Skrásetingar og eftirlit í rakstrinum í samráð við virkisleiðaran.

**Fyrimun hevur umsøkjari ið hevur:**

- Fiskivinnuútbúgving
- Teoretiska vitan um HACCP
- Kunnleika til nýtsluskipanir t.d. Access, Word, Excel og Axapta
- Góðan førleika í enskum máli

**Vit kunna bjóða:**

- Eitt framkomið fakligt umhvørvi
- Eitt virkið og framkomið framleiðsluumhvørvi
- Løn sambært avtalu

Nærri upplýsingar fáast við at venda sær til Ivan Hansen, tlf. 447326 ella Guðrið Andorsdóttir, tlf. 355555.
Umsóknin skal sendast áðrenn 1. juli 2005 til

**Faroe Seafood**
att. Guðrið Andorsdóttir
Postboks 218
FO-110 Tórshavn

# Kunngerð

**Frá útskiftingarnevndini á Syðradali**

Næsti útskiftingarfundur verður hósdagin 23. juni kl. 11 í skúlanum á Syðradali.

**Fram verður lagt:**

1. Endaligur útskiftingarplanur. Kærufreistin er 3 mánaðir

2. Útskiftingin verður endað.

N. v.
**Øssur Á. Midjord**
útsk. form.

MATRIKULSTOVAN 1948

# Lastbilur til sølu

10 tons Man 153F við 5 tons Hiab krana til sølu fyri 175.000 u/ mvg.

**Tlf. 519964**

**Mentamálaráðið**

# Stjórnarskrivari

## hjá landsstýrismanni og aðalstjóra

**Starvið**
Í sambandi við at skrivari okkara hevur valt at søkja aðrar avbjóðingar, er eitt áhugavert og fjølbroytt starv sum skrivari og málsviðgeri leyst at søkja í aðalskrivstovuni .

Høvuðsuppgávurnar hjá stjórnarskrivaranum verða m.a. at:

- Verða skrivari hjá landsstýrismanni, aðalstjóra og aðalskrivstovuni
- Umsita virkisøki, sum verða løgd til skrivaran
- Málsviðgerð
- Samskipa og fyrireika ymiskar arbeiðsuppgávur í aðalskrivstovuni
- Verða við á fundum og skriva fundarfrágreiðingar
- Aðrar uppgávur

**Førleikakrøv**
Vit vænta okkum m.a., at umsøkjarnar hava:

- Útbúgving og/ella royndir í skrivstovuyrkinum
- Í minsta lagi HH-, HT-, students-, HF-prógv ella annað prógv, ið kann javnmetast við hesi
- Góðan kunnleika til føroyskt, danskt, enskt og nýtslu av edv
- Góð samstarvsevni
- Førleika at arbeiða sjálvstøðugt

**Vit bjóða**
Starvið er spennandi við skiftandi uppgávum og við nógvum samskifti inn- og úteftir.

Sjálvstøðugt starv við góðum møguleikum fyri bæði persónligari og fakligari menning.

Tú kemur at arbeiða í einum spennandi umhvørvi við skiftandi uppgávum tætt saman við politisku myndugleikunum og stovnum innan undirvísing og mentan.

**Setanar- og lønartreytir**
Starvið verður sett sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og Starvsmannafelagið og verður lønt í lønarflokki IV.

Viðmerkjast skal, at setanarøkið fevnir um stjórnarráðini og deildir tess.

**Umsókn**
Umsókn við prógvum o.ø skulu sendast til:

**Mentamálaráðið**
Hoyvíksvegur 72
Postrúm 3279
110 Tórshavn

Umsóknin skal verða okkum í hendi í seinasta lagi 4. juli 2005 kl. 16.00.

Starvið verður at seta skjótast tilber.

Um tú ynskir fleiri upplýsingar, kanst tú seta teg í samband við Petur Petersen, aðalstjóra í Mentamálaráðnum, á tlf. 35 50 50.

***Mentamálaráðið** hevur sum høvuðsuppgávu at fyrisita undirvísingarmál, mentamál og gransking. Harafturat eru uppgávur viðvíkjandi kirkju, loftmiðlum, ítrótti og øðrum frítíðarvirksemi.*
***Í aðalskrivstovuni** er landsstýrismaður, aðalstjóri, løgfrøðingar, búskaparfrøðingar og starvsfólkaleiðarin.*

# Telduarbeiði til lesandi

Á Havlívfrøðiligu royndarstøðini í Kaldbak hava vit brúk fyri einum lesandi á telduøkinum til eitt avmarkað arbeiði í summarfríðtíðini.

Talan er um at gera og laga til brúkaraflatur í databasuforritinum MS Access og arbeiði við heimasíðugerð. Annað fyrifallandi telduarbeiði kann eisini koma uppá tal.

Um tú hevur royndir innan hesi øki, set teg tá í samband við okkum.

Løn sambært avtalu.

**Havlívfrøðiliga royndarstøðin**
FO-180 Kaldbak
Tlf. 356111
Teldupostur: Mailto@havbotnur.fo

# Urguleikarafelagið

Hevur aðalfund tann 28. juni 2005 á loftinum í Havnar kirkju.

Skrá sambært lógum felagsins.

**Nevndin**

# Vegna feriu

verður Sjúkrakassin stongdur frá 27. juni til 25. juli 2005.

**Suðuroyar Sunnari Sjúkrakassi**